# Beinleiðis úr Føroyum til gullstrondina í Spania

**14 dagar undir sólini**



...úr Føroyum 7. juli, 21. juli og 4. august



## Costa Dorada

Flogfelag Føroya skipar aftur í ár fyri ferð til gullstrondina í Spania, Costa Dorada. Flogið verður beinleiðis úr Føroyum 7. juli, 21 juli og 4. august.

Gist verður í kenda feriubýnum Salou, ið liggur við stóru Costa Dorada strondina. Beint við liggur tað størsta stuttleikastaðið, Port Aventura, umframt tað stóra "Vatnlandið". Eisini verður skipað fyri útferðum.

Møguleiki er at velja ímillum 3 ymisk hotel ella íbúðir.

Ring ella støkk inn á gólvið og fá meira at vita um hendan frálíka møguleikan.



*PRÍSDØMI:*
*Hotel Michelangelo*
***+, 2 fólk.............* **8.900,- pr. pers.**
*1/2 pens.*
*Bólkur min. 10 fólk.....* **7.900,- pr. pers.**
*1/2 pens.*



*PRÍSDØMI:*
*Hotel Europa*
****, 2 fólk........* **9.100,- pr. pers.**
*1/2 pens.*

*PRÍSDØMI:*
*Íbúð Uolas ella íbúð Aqurio*
****, 4 fólk........* **6.800,- pr. pers.**



*PRÍSDØMI:*
*Hotel Estival Park*
*****, 2 fólk.........* **10.250,- pr. pers.**
*1/2 pens.*

ÚTSELT 7. JULI OG 4. AUG.

*Í øllum prísum er íroknað: Flogferð, ferðaavgjøld og innivist*

*• Avsláttur fyri børn 2-12 ár: 1.500,- kr. umframt hópin av øðrum avsláttarskipanum. Kom inn og hoyr nærri...*

**FLOGFELAG FØROYA**
Áarvegur 6 • Postboks 3225 • FO-110 Tórshavn
Tel 31 10 25 • Fax 31 86 70 • e-mail: travel@ff.fo

petur & petur • 320870



## *Roknskaparleiðari* til TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

**Til Tryggingarfelagið Føroyar verður søkt eftir roknskaparleiðara.**

***Starvið***
Leiðarin stendur fyri roknskapardeildini og skal skipa fyri, at deildin altíð virkar væl og er ajour við sínum arbeiði.
Roknskaparleiðarin hevur m.a. ábyrgdina av

*Perioduroknskapum, deildarroknskapum, ársroknskapum og øðrum møguligum roknskaparuppgerðum fyri allar deildir og dótturfeløg*

*fíggjarætlanum og uppfylging av teimum*

*likviditetsuppgerðum*

*hagtølum*

***Førleiki***
Tann, sum setast skal í starvið, má hava góðan roknskaparligan førleika, og dentur verður lagdur á góð samstarvsevnir, leiðaraevnir- og royndir. Lønin verður ásett eftir nærri avtalu.

***Umsókn***
Umsóknir, saman við prógvum og viðmælum, skulu verða Starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi hósdagin 22. juni 2000.

*Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Gunnar í Liða, stjóra.*

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
*The Faroe Insurance Company*

Kongabrúgvin
P.O.Box 329
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 345600
Fax +298 345601
tf@trygging.fo
www.trygging.fo

SANSIR · TEL 355 355


## Yvirlýsing frá Meinigheitshúsinum í Havn

Vit harmast um blaðskrivingina seinastu tíðina sum Meinigheitshúsið er drigið uppí.

Øll eru hjartaliga vælkomin til øll tiltøk, ið verða hildin í Meinigheitshúsinum – Eingin er útihýstur.

Vit vilja við hesum samstundis siga frá, at vit ikki vilja fara út í alment blaðtjak. Øll, ið hava spurningar eru hjartaliga vælkomin at venda sær til stýrið.

Vinarliga:

**Stýrið fyri Meinigheitshúsið í Havn**
Húsagøta 1 • 100 Tórshavn




**Trygdarútgerð til øll endamál!**

- Verndarhjálmar og húgvur
- Hoyrivernd v/FM radio
- Brillur
- Maskur
- Trygdarskógvar
- Fallsikringar
- Handskar
- Hondreins
- Vit útvega skiltir til **øll** endamál!

**Vit taka okkum av øllum uppgávum innan arbeiðaravernd**

*Tosið við okkum!*

**Kaj Andreasen & Co**
Sandvíkarhjalli
Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311820



**ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR**

**F.A. BILLUTIR**
tlf. 421605 fax 421666





## Campingvognur TEC 415

í sera góðum standi, fortelti bert 4 ár v/køliskápi og gassskipan til sølu fyri kr. 30.000,-

**Telf. 315042 eftir kl. 18**


## EYDNUHJÓL

Haldórsvíkar Avhaldsfelag hevur eydnuhjól v/ matsølu og fiskibrunni 12. juni.

Nógvir góðir lutir verða at vinna.

Um nakar vil stuðla við lutum, kunnu tey venda sær til ein av nevndarlimunum, Paulivar tlf. 423319 – Katrin tlf. 423491 – Hallgerð tlf. 423368 – Hjalma tlf. 423343 – Hansa tlf. 423348 í seinasta lagi 6. juni.

Tikið verður eisini ímóti lutum í Avhaldshúsinum týsdagin 6. juni frá kl. 19.00–22.00.

*Vinarliga,* **Nevndin**


**ADC-Heilsølan**
*Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893*

**ARBEIÐSHANDSKAR**
*Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi*

**LANDSINS STØRSTA ÚRVAL**
*frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar*

**BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA**

ADC



**DANNY TRANSPORT**

- tá okkurt skal koyrast ella goymast

**Tlf. 319192**




# Samstarva um ruskið

*Føroysku brennistøðirnar eru við í donskum samstarvi um endurnýtslu av ruskinum. Felagsskapurin hevði fund í Føroyum um dagarnar*

EDVARD JOENSEN



Tað er neyðugt at skilja burturkastið, Bæði fyri at verja umhvørvið, men eisini fyri at spara pengar, sigur stjórin í donskum felagsskapi fyri brennistøðir

Føroysku brennistøðrinar eru limir í felagsskapinum hjá flestu donsku brennistøðunum, Renosam. Hesin felagsskapur hevði fund í Føroyum um dagarnar, og samstundis varð eisini vitjað ymsastaðni í landinum. Sum vera man varð vitjað bæði á Sandvíkarhjalla og á Hagaleiti. Eisini í Skúvoy varð vitjað, har hugt varð at umhvørvishúsinum, sum IRF bygdi har úti fyri umleið tveimum árum síðan.

Í Danmark eru 32 renovatiónsfelagsskapir, greiðir stjórin í Renosam, Nete Jakobsen, frá. Av hesum 32 eru 27 skipaðir í felagskapin Renosam saman við teimum báðum føroysku, IRF og KOB. Uttan fyri Renosam standa støðirnar í København og í Norðurjyllandi. Nete Jakobsen væntar tó, at tær norðurjysku fara at gerast limir einaferð í framtíðini.

Limirnir í Renosam hava árligar fundir, har felagsmál verða viðgjørd. Hesir fundirnir verða hildnir upp á skift runt hjá teimum ymsum limunum. Í ár var túrurin komin til føroysku limirnar at vera vertir.

Fyrimunirnir við at vera í felagsskapi eru sjálvandi, at lættari er at samskipa arbeiðið, brennistøðirnar gera. Tí arbeiðið á brennistøðini er annað enn at savna inn rusk og brenna tað. Tað er í stóran mun at skilja tað, sum fólk tveita burtur og endurvinna tað, sum brúkast kann, sigur Nete Jakobsen.

Tað gongur hampiliga væl at fáa burturkastið í Danmark viðgjørt ordiliga, sigur Nete Jakobsen. Men tað krevur sjálvandi, at tann einstaki brúkarin eisini er medvitandi um teir fyrimunir, sum í seinna enda fáast av, at rætt verður atborið, tá ymiskt verður beint av vegnum. At fólk longu tá tey kasta burtur, skilja tað, tey forkoma. Vanligt húsarhaldsburturkast fyri seg, glas, pappír, elektronik og so framvegis.

Og tað mugu vit í Føroyum eisini fara at venja okkum við. Poul Andrias Joensen, stjóri í IRF, sigur, at vit í næstum kunnu vænta at fáa pappírsbingjur at síggja her heima. Tað vil siga ruskíløt at lata gamlar avísir, vikubløð og tílíkt í, soleiðis tað fer at bera til at endurvinna pappírið.

Tað hjálpir væl upp á umhvørvi. Minni trænýtsla, minni orkunýtsla, minni vatnnýtsla, so tað skuldu verið sjálvsagdir fyrimunir. Tað krevur bara, at fólk koyra pappírið í bingjur fyri seg.

Tað krevur ikki tað stóra av brúkaranum at skilja ruskið. Men royndirnar vísa, sigur Nete Jakobsen, stjóri í Renosam, at fólk kortini mugu haldast til alla tíðina.

Tí verður slaka við áheitanum og upplýsing, er líkt til, at fólk gloyma skjótt, sigur hon.

# Skipafelagið Føroyar havt aðalfund



Árni Joensen, stjóri á Skipafelagnum

*Skipafelagið Føroyar hevði aðalfund mikudagin. Úrslitið fyri 1999 var 22,4 milliónir krónur og netto úrslitið var 13 milliónir*

EDVARD JOENSEN

Úrslitið av rakstrinum hjá Skipafelagnum Føroyar var einar 10 milliónur krónur betri, enn tað var í 1998, sigur Árni Joensen, stjóri á Skipafelagnum.

Um fíggjastøðuna hjá Skipafelagnum, sigur Árni Joensen, at hon kann góðtakast, men at hann fegin vildi havt hana at verið nógv betri.

Skipafelagið hevur í løtuni góðar 30 milliónir krónur í eginpeningi, upplýsir stjórin.

Nevndin i felagnum varð øll afturvald á aðalfundinum mikudagin. Í henni sita: Líggjas í Bø, sum er formaður. Hinir nevndarlimirnir eru Hans Andrias Dam, John Dam, Árni Dam, Julinna Klett, Danjal Pauli Danielsen og H. Lamain.

Skipafelagið Føroyar er eitt flutningsfelag, sum fólk mest seta í samband við vøruflutning millum Føroyar og Danmark. Hetta er eisini høvuðsvinnan hjá felagnum.

Men Skipafelagið arbeiðir á so nógvum øðrum mótum, sigur Árni Joensen, stjóri.

Eitt nú vit at fáa fremmand skip hendan vegin at umskipa. Flutning av rækjum úr Canada til Europa, umframt at Skipafelagið hevur eina flutnings fyritøku í Danmark, Spedition Atlantic, sum flytir farm yvir land við lastbilum.

Arbeitt verður alla tíðina við at víðka verandi vinnu og finna nýggjar møguleikar, sigur Árni Joensen.

Um útbyggingarætlanir í flotanum sigur hann, at tað verður arbeitt við tí. Meira vil hann ikki siga í løtuni.


**Perlan í SMS søkir eftir fólki**
**- at byrja skjótast til ber - vit sóknast eftir:**

## KØKS- ella KAFETERIA-ASSISTENTI og LÆRLINGI

Ert tú fryntlig/ur, smílandi og dámar at hava við fólk at gera, hava vit eitt spennandi starv til tín á einum lívligum arbeiðsplássi, har nakað hendir alla tíðina.

Vit vænta av tær, at tú kanst arbeiða skiftandi tíðir, ikki ert bangin fyri at taka ábyrgd og klárar at arbeiða undir trýsti. Eisini verður stórur dentur lagdur á at reinføri í Perluni alla tíðina er í topp.

Møgulig íbúð kann útvegast frá 1. august.

Ljóðar hetta sum nakað fyri teg, so ring og tosa við Hans ella Tóru.

MATSTOVAN FYRI ALLA FAMILJUNA
Perlan

Postboks 1245 • 110 Tórshavn • TLF. 315061